Fra: Felagið Hoyr <hoyr@hoyr.fo>
Sendt: 25. oktober 2023 12:49
Til: Bárður Atlason Ísheim <bardur@megd.fo>
Emne: Re: SKUNDMÁL / HOYRING - Trý lógaruppskot, ið skerja rættindi hjá fólki, ið bera brek

Hey Bárður!

Eg nái ikki at gera hoyringsskriv til hesi uppskotini.

Uppskotini gera støðuna hjá fólki, ið bera brek nógv verri, og eigur hetta ikki at koma fyri.

Vit taka undir við tykkara hoyringssvarið.

Vinarliga vegna Hoyr

Ása Olsen

Sendt fra min iPhone

Den 23.10.2023 kl. 10.45 skrev Bárður Atlason Ísheim <bardur@megd.fo>:

Góðu limafeløg,

Trivnaðarnevnd Løgtingsins hevur innkallað umboð fyri MEGD til fundar hósdagin 26. oktober 2023 í sambandi við nevndarviðgerð av trimum lógaruppskotum. Orsaka av sparingum fara hesi trý lógaruppskotini at skerja rættindi hjá fólki, ið bera brek. Samstundis varð einki av uppskotunum sent til hoyringar, hvørki hjá eitt nú limafeløgunum ella hjá meginfelagnum. Av hesi orsøk, gjørdi forkvinnan hjá MEGD fyrst í oktober vart við týdningin av at hoyra viðkomandi feløg, tá lógaruppskot verða smíðjað, millum annað við greinini Hoyringar fremja dygd og góðsku og við móttmælisskrivi til landsstýrið. Løgmaður svaraði forkvinnuni hjá MEGD við brævi, har hann viðurkendi at landsstýrið í framtíðini eigur at taka hoyringar í størri álvara. Tey trý lógaruppskotini eru hesi:

1. LM-025/2023 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) **(Heilivágur gerst dýrari fyri fólk, ið bera brek)**
2. LM-022/2023 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur **(Stuðulin til bil verður skerdur)**
3. LM-023/2023 - Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk **(Serlig stuðulsveiting til lesandi, ið bera brek, verður strikað)**

Um tit hava viðmerkingar til eitt ella fleiri av hesum lógaruppskotum, eru tit vælkomin at senda hesar til megd@megd.fo **í seinasta lagi í ovurmorgin, mikudagin 25. oktober kl. 15:00**.
Eru spurningar ella ivamál, eru tit eisini vælkomin at skriva til megd@megd.fo.

Vinarliga,
MEGD

Íslandsvegur 10C
FO-100 Tórshavn
bardur@megd.fo
Tlf. +298 527373
www.megd.fo